# UPPGÁVA 2B

## Skilaleys koyring á skutara

Tit skulu gera eina søgu um vanlukkuna

- Byrjið við at lesa greinastubban um vanlukkuna
- Persónarnir í vanlukkuni eru persónarnir, sum tit hava gjørt
- Tit skulu greiða frá, hví kvøldið hjá teimum endaði soleiðis

**Søgan, sum tit gera, skal svara hesum spurningum:**

- Hvør var fyri vanlukku?
- Vóru teir í hjálmi?
- Hvønn koyrdi hann kapp við?
- Hví fóru teir at koyra kapp?
- Hví koyrdi hann skilaleyst?
- Hvat gjørdu hini vinfólkini, ímeðan teir koyrdu?
- Tóku tey øll undir við, at teir skuldu koyra kapp?

Søgan skal passa til teir fýra persónarnar, sum tit hava gjørt.

### Skilaleys koyring á skutara

Ein álvarslig ferðsluvanlukka var í gjárkvøldið orsakað av skilaleysari koyring á skutara. Ein 16 ára gamal drongur rendi á ein betongstabba á einum parkeringsøki. Drongurin misti tamarhaldið á skutaranum í myrkrinum.

Vitni hava greitt løgregluni frá, at tveir javngamlir dreingir koyrdu kapp á økinum, meðan ein bólkur av javnaldrum stóðu og hugdu at.

Drongurin er innlagdur á Landssjúkrahúsið, og løgreglan sigur, at støðan hjá honum er álvarslig.

Tilfar brúkt við loyvi frá:
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
RÅDET FOR SIKKER TRAFIK